Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Klik her for at angive tekst.

Dagfesting
1. oktober 2020

Okkara j.nr.
20/03746-3

Málsviðgeri
Anita Fuglø

Tygara j.nr.

Hoyringssvar viðv. ætlaðu broytingunum í ALS – lógini

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur fingið til ummælis uppskot til løgtingslóg um broytingar í ALS – lógini.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur samanumtikið undir við ætlaðu broytingunum.

Felagið ynskir kortini at gera vart við, at hoyringsfreistin at viðgera lógaruppskotið er alt ov stutt, eisini hóast at nakrar av broytingunum eru tillagingar í mun til annan sáttmála og lóggávu. Stutta hoyringsfreistin hevur við sær, at lógaruppskotið ikki hevur fingið eina nøktandi viðger í nevnd felagsins.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur út frá verandi upplýsingum um fíggjarligu støðuna hjá skipanini – og út frá búskaparligu útlitinum undir við at lækka inngjaldið niður í 1%. Felagið tekur somuleiðis undir við at hækka arbeiðsloysisstuðulin úr 75% upp í 80% av lønini, tó við einum hægsta marki á 18.500 kr. um mánaðin.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið meinar, at ALS – skipanin er ein trygg og góð skipan til starvsfólk, sum av ymiskum ávum gerast arbeiðsleys. Hinvegin, meinar felagið eisini, at tíðin helst er komin hartil, at skipanin eigur at verða endurskoðað, sum tryggingarskipan fyri starvsfólk, sum gerast arbeiðsleys eitt tíðarskeið í lívinum. Hervið verður spurnartekin sett við um skipanin fevnir nóg breitt í mun til ymisleikan á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum í dag.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið meinar, at ALS – skipanin eigur at verða endurskoðað m.a. eigur at verða hugd at tíðini, sum starvsfólk kunnu verða í skipanini. Hugd eigur at verða eftir um tíðin starvsfólk kunnu fáa útgjald úr skipanini evt. kann styttast, meðan upphæddin starvsfólk fáa úr skipanini møguliga kann verða sett hægri eitt tíðarskeið. Aðrar millumloysnir finnast eisini, verða starvsfólk í skipanini í eitt longri tíðarskeið, tá má útgjaldið eisini lækka aftur.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur undir við at ALS – lóggávan verður tillagað soleiðis, at samsvar er millum lógina og norðurlendska sáttmálan og við ásetingarnar í eftirlønarlógini.

Sum áður nevnt tekur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið undir við broytingunum í lógaruppskotinum.

Vinaliga

Vegna Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Anita Fuglø, leiðari